# na familjuna«

Schlüteri. Fólkatingið fór heldur ikki at fella hann, tí teir radikalu vóru ikki til reiðar at lata javnaðarmenn sleppa framat – enn. Sakirnar hjá Uffa skaðaðu stjórnina, men helst ikki so nógv, tí Uffe fektaði við opnari pannu og var beistaktiga sjarmerandi.

Uffe metti, at tað var ráðiligt at vera sitandi. Tað gjørdi Henrietta ikki.

### Fornemmilsi fyri

Júst tað taktiska fornemmilsi, gefühl, í slíkum støðum er avgerðandi. Jóannes Eidesgaard løgmaður vísti, at hann hevur neyðuga taktiska fatan í málinum um Johan Dahl. Málið hevði sjálvsagt onki við embætisførsluna at gera, men har var somikið nógv grums um persónin Johan Dahl, at tað kundi sett dám á





*Eisini her í Føroyum hava ráðharrir verið noyddir at leggja kongin, men ta? er ofta stórur munur á, hvussu langt málið ver?ur drigið út, áðrenn seinasti útvegurin verður valdur*

fyrstu tíðina hjá samgonguni og enda í politiskum sorgarleiki. Hesum byrgdi løgmaður fyri við at fáa Johan frá og við at tryggja sær, at sambandsmenn lótu sær lynda.

Føroyingar hava tó ikki havt fornemmilsi fyri at smíða nóg smydliga politiska skipan. Vit hava valt at umsett fáar útvaldar partar av donsku skipanini. Vit hava ikki samráð, vit hava ikki hoyringar og tingið kann ikki gera niðurstøður eftir spurnarorðaskifti. Tingið manglar við hesum og øðrum mangar streingir til at kunna spæla sín part í stjórnarliga samspælinum. Mangar sakir enda í Danmark við at ting ella tingnevnd kemur við átalu ella aðrari niðurstøðu. Mangar sakir eru eisini partur av politiska spælinum, tær taka seg upp ella fáa týdning vegna rembingar innanfloks ella í samgongu.

Tey, sum ynskja innlit í danska politiska heimin, kunnu keypa sær DVD útgávuna av filminum Kongekabale. Hóast fleiri persónar í filminum eru lýstir í einfalt svartir ella hvítir, so byggja teir nærum allir á aktivar danskar politikarar. Á fløguni eru viðmerkingar um og lýsingar av politiskum fyribrygdum og fyrimyndum.

Poltikkur er trupul kabal, sum krevur fornemmilsi at fáa at ganga upp.

# Aðrir revsa, meðan vit geva

TINGHELLUKLUMMAN
*Finnbogi Ísakson*
*finnbogi@post.olivant.fo*



Danska tíðindastovan Ritzau skrivaði 7. januar í ár um, at *"Momskarrusel gav hårde straffe til ægtepar"*. Tað var Bakmanspolitiið, sum aftur hevði vunnið ein sigur í stríðnum móti teimum sokallaðu momskarrusellunum. Hetta er eitt orð fyri skipaðum svindli við meirvirðisgjaldi (momsi) og øðrum avgjøldum gjøgnum meira og minni fiktivan handil við nýtsluvørum tvørtur um landamørk.

Í hesum føri var talan um eini hjún í Silkeborg. Tey høvdu ikki verið smálig í sínum handli: tey høvdu keypt fartelefonir úr Noregi fyri 157 mió.nkr. og høvdu hvørki avroknað moms ella toll, tá fartelefonirnar vórðu seldar víðari í Danmark.

Dómsmannarætturin í Silkeborg var ikki mildur: tann 63 ára gamli maðurin fekk fongsulsrevsing í 5 ár, og kona hansara, sum er 10 ár yngri, fekk helvtina so stranga revsing ella 2½ ár í fongsli. Haraftrat fingu tey 18,6 mió.kr. í bót í part. Ella kundu tey sita í 60 dagar aftrat.

Í Danmark hevur verið nógv kjak ta seinasta hálva árið um, at kioskir, pizzariur og matstovur svindla illa við momsi og skatti. En kanning, sum Toll og Skatt gjørdi í Eysturjyllandi í oktober 2004, vísti, at 22 av 25 matstovum, sum eisini vórðu kannaðar í juni, høvdu framvegis ikki fingið skil á hesum viðurskiftum.

Sosialdemokratarnir ætlaðu í heyst at leggja uppskot fyri Fólkatingið um, at triðju ferð, ein handil ella matstova verður tikin fyri at snýta, skal vinnuloyvið verða inndrigið. Tað merkir, at handil, kiosk ella matstova muga lata aftur. SF og Danski Fólkaflokkurin tóku undir við hesum.

Skattamálaráðharrin Kristian Jensen hevur sagt, at í ár verður revsingin hjá handlum, sum snýta í momsi og skatti, herd. Tað kann vera, at tær missa vinnubrævið og noyðast at lata aftur. Hetta kann so ikki setast í verk fyrr enn seinni í ár, tí higartil hava handlar í Danmark ikki havt vinnubræv. Lógin um, at handlar og onnur, sum selja matvørur, skula hava vinnubræv, kemur ikki í gildi fyrr enn 1. juli ár.

Gongdin í Danmark er sostatt at herða reglurnar ma. fyri tey, sum ikki avrokna meirvirðisgjald. Í Føroyum fara løgting og landsstýri øvugtan veg.

Í oktober legði Bárður Nielsen uppskot fyri Tingið um at eftirgeva skuld til landskassan. Tað fekk 1. viðgerð og fór í Fíggjarnevndina, har tað hevur ligið í frið og náðum til nú. Í síðstu viku varð øll Fíggjarnevndin boðsend at koma út í Fíggjarmálastýrið, har hon eftir øllum at døma varð væl og virðiliga heilavaskað til at taka undir við uppskotinum.

Hetta er eitt hættisligt mál. Reglurnar í konkurslógini um skuldarumskipan (gældsanering), vórðu settar í gildi í Føroyum í 1989. Ein lóg frá 1987 um at eftirgeva skuld til landskassan, varð tí tikin av í 1993 eftir uppskoti frá táverandi løgmanni Maritu Petersen.

Tann danska lógin um skuldarumskipan tykist at vera nóg lagalig til danir, men vit føroyingar muga vera gávumildari, tá tað ræður um at brúka fólksins pening. Í viðmerkingunum til uppskotið skrivar Landsstýrið:

*"Høvuðsendamálið við hesum lógaruppskoti er at veita heimild til, at ávís skuld til landskassan kann umskipast, hóast skiftirætturin hevur avvíst at viðgera skuldina eftir reglunum í konkurslógini um skuldarumskipan. Ætlanin er tí, at reglurnar í hesum lógaruppskoti skulu vera eitt ískoyti til reglurnar í konkurslógini um skuldarumskipan."*

Tað eru ikki hissini møguleikar, latið verður upp fyri. Ætlanin er, at ein nevnd, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum setir, skal kunna umskipa ella eftirgeva skuld á hesum økjum:

- *Skatta- / arbeiðmarknareftirlønargjaldsskuld til landskassan*
- *Skuld orsakað av, at meirvirðisgjald ikki er goldið*
- *Tollskuld*
- *Skuld, stavandi frá lønhæddaravgjaldi*
- *Skuld orsakað av, at framleiðslugjald ikki er goldið*
- *Skuld frá lánum til vinnuna, ið eru veitt til eitt nú fiskiflotan, farmaflotan*
- *Skuld í sambandi við, at landskassin hevur veðhildið*
- *Skuld, stavandi frá lestrarlánum frá Stuðulsstovninum*
- *Rentuskuld og skuld frá øðrum útreiðslum, ið eru knýttar at høvuðsskuldini*

Tað eru fá ár síðani, at Landsstýrið eftirgav skuld, sum summi rækjuskip høvdu til landskassan, so at tey kundu halda fram at kappast við onnur skip, sum høvdu goldið sína skuld, og sum høvdu ov fáar rækjur at fiska. Nú skal so sami rækjufloti hava beinleiðis studning úr landskassanum. Reiðarar, sum høvdu røkt sínar skyldur, vóru, sum vera man, illa skølsettir av, at aðrir bara sluppu frá at gjalda.

Eg havi fyrr víst á vandan við hesi nýggju eftirgeving-aralógini. Tað verður gjørligt at eftirgeva lestrarskuld. Hvør fer at gjalda lestrarskuld í framtíðini?

Ringasti rákin í mínum munni er kortini meirvirðisgjaldið. Tá fólk fáa løn, er hon teirra ogn. Løgtingið hevur tó við lóg ásett, at landskassin og kommunurnar skula hava ein part av hesi ogn til almenna umsiting og útbygging, okkum øllum til frama. Tað kallast skattur.

Øðrvísi er við meirvirðisgjaldinum. Tann, sum krevur tað inn, eigur tað ongantíð. Tað er landsins ogn. Tann, sum ikki ber peningin víðari til eigaran, sum er landskassin, stjelur hann.

Nú skal verða gjørligt at strika heilar 60 mió.kr, sum fólk av órøttum hava ognað sær burtur av meirvirðisgjaldinum hjá landskassanum. Kann tað ikki hugsast, at tað fer at vinda uppá seg við eftirstøðum av MVG, tá innkrevjarin kann rokna við at fáa eftirstøðuna strikaða fult ella partvíst?

Eg skilji ikki, at Løgtingið so gleivbeint tekur undir við hesum uppskoti. Jóannes Eidesgaard løgmaður hevur fyrr sagt fyri at verja seg móti atfinningum frá fakfeløgum, at skattalættin til háinntøkur er prísurin, Javnaðarflokkurin noyðist at gjalda fyri at fáa eina pensjónshækking framda. Er henda lógin um at strika skuld prísurin, Fólkaflokkurin skal hava fyri at spæla við? Er alt samgonguskjalið *ein* stórur rossahandil?

Eg fari inniliga at heita á teir ráðandi um í minsta lagi at gera hetta:

1) Fái onkran uttanveltaðan at gera eina skjóta kanning av, hvussu skipanirnar eru við at leggja um ella strika skuld til tað almenna í Danmark, Noregi og Íslandi.
2) Kunna tit heldur ikki tað, setið so í hesa ólukku lóg, at hon fer úr gildi aftur 31. desember 2006. Tað hevði av illum havt við sær, at løgting og landsstýri høvdu noyðst at mett um dygdina ella ódygdina í henni.